FRÁFARINGARROYND FÓLKASKÚLANS
MAI - JUNI 2007
SKRIVLIG FRAMSETING

FØROYSKT

4 tímar

Næmingurin kann hava hetta uppgávuarkið alla tíðina. Loyvt er at brúka orðabøkur.

Vel eitt av hesum evnum:

1 **Fiskimenn og fiskikonur?**

2 **Lívsins morgun**

3 **Rasisma á vøllinum**

4 **Føroysk einstaklingaavrik**

5 **Lýs, milda ljós**

1

Fiskimenn og fiskikonur?

Les tekstin niðanfyri

- Skriva, millum annað við støði í tekstinum, tína hugsan um sjólív og fiskiskap, og at mannfólk og konufólk eru saman til skips – og minst til at grundgeva tíni sjónarmið

„Sjólívið er ordiliga vell"

Seinnapartin í gjár mynstraði Diana Poulsen úr Klaksvík umborð á Atlantic Navigator. – Allar tær, sum eg havi kamar saman við, eru sera fittar, so tað er gott, sigur tann 17 ára gamla „sjókonan"

– Henda túrin er beiggi mín, Grímur, eisini við. So tað er bara fínt, sigur Diana.

Sjólívið hevur altíð havt nógv at siga heima við hús hjá Dianu. Pápi hennara eigur ein útróðrarbát í Klaksvík, og tað hevur sjálvandi havt sína ávirkan á heimalívið. – Tá ið hann kom aftur av útróðri, plagdi eg altíð at spyrja hann, hvussu mikið teir høvdu fingið. So hjá mær er hetta heilt natúrligt, sigur Diana.

Tað er so mangt, ið ger, at Dianu dámar sjólívið so væl.

– Eg hevði hug at royna okkurt nýtt. Eg haldi, at sjólívið er sera spennandi. Og so fáa vit eisini rættiliga góða løn, slær hon fast.

Áðrenn Diana fór til skips, hevði hon m.a. arbeitt á landi, í klædnahandli og í kiosk í Klaksvík.

Atlantic Navigator kom aftur av túri beint fyri nýggjár. Hann hevði stívliga 2.200 tons av surimi og fiskamjøli henda túrin, so eingin orsøk er at fýlast á fiskiskapin. Túrurin var umleið 6 vikur. – Eg haldi, at túrurin var góður, men hann var kanska í longra lagi. Men hvat? Vit fingu so fulla last, sigur hon.

Nú Navigator loysti í gjár, vóru 110 fólk við. Umleið 20 teirra vóru konufólk. Sjálv heldur Diana tað vera sera gott og ikki minst hugnaligt, at kvinnur eisini manna ein slíkan trolara.

Á seinasta túrinum arbeiddi Diana í verksmiðjuni, har hon stóð við maskinurnar og vendi fiskinum.
Diana og mong við henni hava tikið fartelduna við sær umborð at stytta sær stundir á frívaktini.
– Hon er sera hent, bæði á frívakt og tá ið minni er at gera, sigur Diana. Telduna brúkar hon at hyggja at filmum og at lurta eftir tónleiki. Í arbeiðsdegnum kann mp3-spælarin við oyrnatelefonum eisini vera hentur, og av netinum kanst tú taka tónleikin niður og leggja hann inn í mp3-spælaran, sigur Diana.

(Sosialurin 4. januar 2007, tillagað)

2

Lívsins morgun

Les yrkingina

- Lýs kenslur, ábyrgd og framtíðarvónir

Morgun

Orð og lag: Martin Joensen

Morgun og nýføddur grátur.
Vælkomin lítli, stíg inn
í henda heimin sum gestur
kanska tú dvølur eitt bil

Um tú vilt korini vita,
best at eg sigi sum minst.
Tó eingin veit um júst títt lív
skapt er til eydnu og ljós

Ábyrgdin á tínum herðum
gáva frá okkum til tín
byrða, ið tung er at bera
ber hana betur enn vit

Heimurin fyri tær opin
kannar teg gjølla og væl
merktur av ringastu royndum
býður tær kortini sess

Men, tú eigur dagin og ljósið
tú eigur náttina við
tú eigur stjørnurnar allar
tú eigur rættin til frið

Viljin er sterkasta svørðið
– bítur á harðasta stál
vónin er bjartasti brandur
lýsir tær veg fram á mál

Ábyrgdin á tínum herðum
gáva frá okkum til tín
byrða, ið tung er at bera
ber hana betur enn vit

3

Rasisma á vøllinum

Les tekstin

- Sig tína hugsan um innihaldið í tekstinum
- Er rasisma ein trupulleiki í Føroyum?

Ein spælari hjá B36 sigur, at nú er ovboðið. Rasisman sleppur at blóma á fótbóltsvøllinum at kalla hvønn dyst, hann spælir.

– Eg veit væl, at endamálið er, at eg skal missa tamarhaldið á mær sjálvum, og tað er eisini nær við viðhvørt. Oftast klári eg tó at halda mær og bara hugsa um sjálvt spælið, ikki minst tí at liðfelagar mínir stuðla mær so ótrúliga væl, sigur Alex Dos Santos um rasistiska ágangin á vøllinum.

– Sjálvandi eru provokatiónir ein partur av spælinum. Tað er einki óvanligt, at spælarar illneitast á hvønn annan, men tá ið tú ferð eftir ferð upplivir primitiva rasismu á vøllinum, fært tú nóg mikið fyrr ella seinni. Og eg havi fingið nóg mikið.
Seinastu trý árini hevur vinstrabeinti brasilski verjuleikarin verið ein av bestu leikarunum hjá B36.
– Mær dámar væl at spæla bólt, og eg trívist væl í Føroyum. Nú starvist eg eisini í nýggja ítróttarfrítíðarskúlanum, og tað dámar mær sera væl.

Rasisman oyðileggur nógv

Men trupulleikin er, tá ið spælt verður. Javnt og samt er hann offur fyri rasistiskum viðmerkingum, og hann leggur dent á, at hann er ikki tann einasti spælarin í so máta.
– Hetta er ein trupulleiki, sum allir littir spælarar her á landi hava. Í mínum hugaheimi er hetta ein stórur trupulleiki fyri føroyskan fótbólt, sum FSF, fótbóltsfeløgini og ikki minst dómararnir mugu viðurkenna og gera okkurt við. Nú verða allir dystir tiknir upp á sjónband, so eins væl og aðrar hendingar kunnu revsast, so átti eisini at verið ansað eftir hesum.
– Um tað er so, at rasisma vinnur fram í føroyskum fótbólti, so eigur tað at verða steðgað alt fyri eitt, sigur FSF-forsetin Óli Holm.
– Tað er eitt fyribrigdi, sum avgjørt ikki eigur at vera í ítróttini – og heldur ikki aðrastaðni. Eitt nú hava bæði FIFA og UEFA gjørt nógv fyri at steðga hesum. So fremsta málið hjá okkum skal vera at fáa bæði spælarar, leiðarar og áskoðarar at fata, at hetta eigur ikki at verða góðtikið.

(Sosialurin - nýggjársblaðið 2006/2007)

4

Føroysk einstaklingaavrik

- Skriva um evnið



5

Lýs, milda ljós

- Skriva um evnið